Skjal 21

SRF SOSIALRÁÐGEVARAFELAG FØROYA
Áhugafelagið hjá sosialráðgevum í Føroyum

**Her eru nakrar viðmerkingar til vælferðarlógina, ið er send til hoyringar hjá Sosialráðgevarafelag Føroya.**

Í § 20 í vælferðarlógini stendur, fyribils uppihaldsveiting kann ikki veitast, um persónur ella hjúnafelagi eiga ogn.

Í § 11 í forsorgarlógini stendur "Der kan dog undtagelsesvis ses bort fra besiddelsen af en mindre formue,
som bør bevares af hensyn til boligmæssige forhold eller pågældendes og familiens erhvervs- eller uddannelsesmuligheder."

Við nýggju vælferðarlógini verður ikki møguligt at eiga pening, ið er settur til síðis til útbúgvingar og/ella bústaðarendamál.
Hettar er óheppi hjá borgarum, ið hava verið so skynsom at spart sær upp til lesnað ella íbúðarinnskot, ella eginfígging til eisini hús.
Tað snýr seg ikki um stórar upphæddir burtur verður sæð frá. Uml. Støk kr. 44.148 og Hjún kr. 34.686.

Í Danmark kann man ikki fáa "kontanthjálp" um man hevur ogn yvir 10.000 kr.

§ 25 í Vælferðarlógini, er møguligt at ansa nærskyldum við seinheilsaskaða, sum ikki hava fingið bjóða pláss á vardum bústaði.
Tankin við hesum er góður og endamálið er gott í fleiri førum. Men avleiðingin hjá teimum nærskyldu, sum í møguliga
fleiri áramál eru heima og ansa sjúkum er, at tey missa tilknýtið til arbeiðsmarknaðin. Longri ein er burtur frá arbeiðsmarknaðinum,
minkar møguleikin fyri aftur at fáa tilknýtið til arbeiðsmarknaðin. Tá má aftur tað almenna inn at stuðla við arbeiðsfremjandi tiltøkum og/ella
tillagaðum starvið fyri at fáa viðkomandi inn aftur á arbeiðsmarknaðin.

§ 12 áseting av veiting. Tað hendur stór peningaliga broyting hjá borgarum, ið fáa uppihaldshjálp tá tey fylla 25 ár.
Í dag er t.d. uppihaldshjálpin hjá einum "ikki-sambúgvandi við foreldur undir 25 ár" 7.146,00 kr. "einsamallur ikki forsyrgjari yvir 25 ár" 13.399. Hettar er ein hækkan á 6.253 kr.

Tey, ið eru undir 25 ár og ikki búgva saman við foreldrunum er í einari truplari støðu, tí tey illa fáa rinda fyri eina íbúð/kamar fyri
peningin tey hava eftir tá skattur er farin av. Hettar rakar harðast tey, ið einki bakland hava og annars einki netverk hava at líta á. Tá peningurin er uppi.

Hví júst skerjingin er 25 ár, er møguliga tí, at tá er man ikki í útbúgvingaraldri longur. Men í lívinum hjá teimum, ið eru í
skipanini hjá Almannaverkinum, er eingin broyting. Man er bert blivin eitt ár eldri.

**Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvavgerðarrættin**

§ 4 - Tvingsilsnevndin

Vit í sosialráðgevarafelagnum meta tað vera týdningarmikið eisini at fáa eina sosialfakliga meting í mun til tvingsilsavgerðir. Tí mæla vit til at persónur við sosialfakligari bakgrund verður partur av nevndini.

Sosiala støðan hjá borgaranum er týdningarmikil, tá umstøður verða umrøddar í eini tviglisavgerð. T.d. er viðkomandi heimleysur, hvussu við netverkið, hvussu er við uppihaldsgrundarlagi og hvussu eru umstøðurnar umkring tann sjúkan tá viðkomandi skal útskrivast.

Vinaliga

Jacoba Jacobsen, forkvinna í Sosialráðgevarafelag Føroya